


# Kirkjugarður á Svínaryggi

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo



**Dánjal Pauli Nysted:**

# Yrkti um sínar deyðu synir, fekk nærum somu lagnu

**Tað eru fáar gravir í gamla kirkjugarði uttan gravstein, har »eigarin« kann staðfestast. Eitt undantak er tann hjá Dánjal Pauli Nysted frá Norðskála. Hann er eisini ein partur av føroysku lagnusøguni**

Dánjal Pauli var føddur 20. juli 1866, sonur Ísak Danielsen og Elsu f. Maskerbæk úr Svínáum. Børn teirra fingu eftirnavnið Nysted.

Skiparaprógv tók hann hjá Jens Mohr í 1897, men árið fyri hevði hann ført deksbátin Nelson hjá Poul Johannes – gamla skipara- við Gjógv.

Dánjal Pauli førdi Svanin í Havn í 1897 og 1898, síðani Immanuel hjá Debes Mortensen á Tvøroyri í 1901 og Hjarlgrim í 1902 og 1903.

Í 1904 var Dánjal Pauli við Suðuroynni hjá Hans Jacob Joensen á Borg á Argjum, sum var ættaður úr Svínáum. Í 1905 førdi hann Orion hjá Sofus Evensen í Havn.

Í 1906 lat Dánjal Pauli ein motorbát byggja hjá Elias Johansen í Havn. Hann var 17 tons, hevði tvær mastrar, runda hekku, var merktur FD 381 og fekk navnið Albatros. Hann førdi sjálvur bátin til fiskiskap undir Íslandi og var vanliga sjálvur fimti við. Hann seldi bátin í 1914 til Absalon Jacobsen í Syðrugøtu.

Í 1914 førdi Dánjal Pauli hvalabátin Reykjavík av Ísafirði, í 1916 hvalabátin Egil og í 1920 norska hvalabátin Heklu III.



*Edmund gjørdist bert 17 ár*



*Ísak gjørdist 22 ára gamal*



*Axel Sivertsen hevði eina bjarta framtíð. Hann var 25 ár, skipari, og skuldi giftast, tá ið hann kom heim aftur. Gentan Elsa kundi ikki trúgva, at hon ikki fór at siggja dreingin aftur. Hon helt áfram at gera brúðarútstýr eftir at øll vón var slept*

## Sorgarsangur um synirnar

1920 var eitt feigdarár hjá føroyingum. Tað fórust fýra sluppir við 56 monnum. Eitt av hesum skipum var Kristina við 17 monnum. Henda vanlukkan er umrødd í Gjáar søgu hjá Peter Jacob Sigvardsen.

Henda vanlukkan rakti eisini Súsannu og Dánjal Paula, sum mistu tveir synir, Ísak og Edmund, umframt fostursonin Axel Sivertsen, sum var skipari.

Í hesum sambandi yrkti Dánjal Pauli ein »Sørge-Sang,« sum stóð í Dimmalætting 2. apríl 1921.

Hetta er ein sera kensluborin sangur í 32 ørindum, sum eisini lýsir, hvussu ein slík vanlukka kendist hjá teimum raktu.

Her skal verða endurgivið nøkur ørindini, serliga um teir, sum Dánjal Pauli misti:

*En Sørge-Sang jeg nu synge vil
om mine to Sønner kære,
som drog til Island i Februar,
jeg saa dem ikke mere.*

*Som Blomster skønne de voksed op,
mig til stor Glæde og Fryd.
Al deres Godhed og rene Liv
var Hjemmets største Pryd.*

*Joen Isak, vor ældste Søn,
stilfærdig og rolig var.
Den yngre var sine Forældres Lyst,
han Navnet Edmund bar.*

*Skipperen var min Fostersøn,
jeg aldrig ham glemme vil.
Med ham droge mine Sønner to,
jeg altid dem mindes vil.*

*Hver Søndag de sad og sang,
det var stor Glæde at høre.
De prydede Hjemmet med aandelig Liv,
som maatte vort Hjerte røre.*

*De var altid hinanden saa kær,
de tre havde samme Vugge.
Den Vugge for min Bevidsthed staar
til mine øjne sig slukke.*

*Saa mangen Mand dem berømmet har,
som de var sammen med.
Nu ere de kaldte fra Jordens Møje
til Himlens Herlighed.*

*For mine Øjne den Vugge staar,
jeg ser den saa mangen Stund.
Den samme grav fandt de Venner tre
ved Havets kolde Bund.*

*Der gik Uger og Maaneder tre,
vi vented fra dem at høre.
Men den Dag aldrig for os oprandt,
dem hjem til os kunde føre.*

*Da Maj Maaned til ende var
vi følte da alle for vist,
at Kutter Kristine kom aldrig hjem,
men var ved Island forlist.*

## Kom heim at doyggja uttan sígggja síni aftur

Dánjal Pauli var við Vigilant á sildaveiðu undir Íslandi í 1924. Tað seinasta sum fréttist frá honum er eitt bræv til dóttrina dagfest 27. juli. Hann er tá á sjúkrahúsi á Akureyri. Hann hevði fingið ein rustaðan jarnnagla gjøgnum knæið, sum dovnaði beinanvegin. Men Dánjal Pauli var tá við at koma fyri seg. Hetta brævið vísir ein pápa og mann, sum hevur rættiliga umsorgan fyri sínum.

Men tá hann kemur heim fyrst í september er hann sjúkur av landfarsótt (týfus). Teir fóru inn til læknan á Eiði, sum sá, hvat ið bagdi. Hann ráddi teimum til at fara beinleiðis til Havnar við honum. Tá teir fóru suður ígjøgnum Sundalagið, vóru konan og børnini úti og hoyggjaðu og kundu eygleiða bátin, ið noyddist at sigla framvið. Dánjal Pauli lá eina viku á hospitalinum, har hann doyði 7. september.

Hann varð so jarðaður í Havn, kanska orsakað av ótta fyri smittu. Í hvussu er fekk hann jarnkistu. Tað sær eisini út sum at hann er jarðaður dagin eftir, at hann doyði. Konan var so illa fyri, at hon kom ikki til Havnar til jarðarferðina.

Súsanna sat ógvuliga illa eftir. Teir báðir elstu synirnir gingu burtur 4 ár frammanundan, og tey vóru ikki farin í húsini, ið vóru bygt árið fyri. Fyri menn, sum doyðu av sjúku, var eingin trygging.

Men børnini vóru røsk, og genturnar gjørdu eisini mansarbeiði. Súsanna dugdi sjálv alt til hendurnar, so tey komu væl undan, hóast hesa hørðu lagnu.

Tann 18 ára gamli Esbern tók við tí tunga mannfólkaarbeiðinum í



*Súsanna og Dánjal Pauli vórðu hart rakt av lagnuni*



*Esbern Joensen við grøvina hjá abbanum Dánjal Paula Nysted f. 20.1.1866 - d. 7.9.1924*

húsinum. Men hann doyði longu í 1941 bert 36 ára gamal. Hetta var enn ein smeitur hjá mammuni. Umframt hetta misti hon eisini ommusonin Dánjal Paula, uppkallaður eftir abbanum, bert 11 ára gamlan.

## Minningarorð í Dimmalætting:

Nysted var en dygtig Mand, men han blev hele sit Liv forfulgt af Uheld. Det er ikke let at træffe Mænd, som er i besiddelse af større Elskværdighed, mere Behjælpsomhed, end afdøde var. Sygdom, Uheld og Ulykker havde bøjet ham langt ned, men desuagtet rejste han sig atter med en ikke almindelig Energi. Økonomiske Uheld var han ogsaa hjemsøgt af, men disse smertede ham mere for deres Skyld, som maatte lide sammen med ham, end for hans egen Skyld. Han var efter samstemmende Forklaringer en rask Sømand og interesserede sig levende for alt det gode nye, som fremkom inden for det Felt, som særlig beskæftigede ham.

Her kann eisini verða skoytt uppí, at Dánjal Pauli eisini hevði evni sum heimadoktari. Læknin var jú á Eiði, sum tá var rættiliga langt burtur.

## Ættin

Daniel Pauli giftist við Súsonnu Rasmussen, (1871-1957), dóttir Jógvan hjá Rasmusi.

Tey giftust inn til foreldur hansara og fingu 8 børn:

**1. Joen Isak**
f. 10.08.1897-1920, gekk burtur við Kristinu

**2. Anna Malena Sofie**
f. 18.06.1899-05.03.1992, g.v. Jógvani Joensen úr Leynum, 1898-1964; tey bygdu á Oyrarbakka.

**3. Edmund**
f. 30.07.1902-1920, gekk burtur við Kristinu.

**4. Esbern**
f. 05.09.1905-1941, ógiftur.

**5. Ellen Susanne (Ella)**
f. 26.09.1909-15.07.94, g.v. Joen Jacob Joensen í Sørvági, 1905-77.

**6. Poul Johannes Andreas**
f. 10.11.1911-59, g.v. Simonu M. Steinberg f. 1920 í Sumba; tey búðu í Vági.

**7. Dagmar Sofie**
f. 14. 10.1913, giftist til Danmarkar.

**8. Anna Elisabeth (Betta)**
f. 25.11.1914, fór eisini niður.

*Keldur:*
Randi Joensen
Esbern Joensen
Freydis Poulsen
Páll J. Nolsøe

**Í komandi parti** verður greitt frá Charlottu og Peter Hans Sørensen. Hann var dóttir skraddaran í Dali í fyrri giftu, og hann var úr Byrginum í Søldarfirði.